# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Longu í summar verður siglandi úr Kyrrahavinum norður um Amerika og haðani líka til Oslo (norski granskarin Olav Orheim)*



*Bæði Venesuela og Ekvador hava flutt hermenn og útgerð til kolombiska markið*
*Mynd: Reuters*

# Vandi fyri kríggi í Suðuramerika

**Venesuela og Ekvador hava sent herlið til kolombiska markið, eftir at Kolombia sendi hermenn inn í Ekvador at myrða ein kolombiskan uppreistrarleiðara**

Venesuelski forsetin, Hugo Chávez, segði í gjárkvøldið, at hann hevði givið herinum boð um at flyta tíggju stríðsvognadeildir til kolombiska markið, tí tað, sum er hent, kann enda við kríggi, segði hann.

-Eg vóni, at Guð kann hjálpa okkum, so vit sleppa undan kríggi, men vit fara ikki at lata teir gera seg inn á okkara lendi, segði Chávez. Hann segði, at Venesuela kann als ikki góðtaka, at Kolombia í síðstu viku sendi hermenn inn í Ekvador at myrða Raul Reyes, sum var ein av oddamonnunum í vinstrasinnaðu uppreistrarrørsluni í Kolombia, FARC.

-Hetta var ein svikagerð, segði venesuelski forsetin.

Hugo Chávez er ikki einsamallur um ta áskoðanina. Forsetin í Ekvador, Rafael Corres, segði í gjár, at stigið hjá kolombisku myndugleikunum kann á ongan hátt góðtakast.

-Eg havi gjørt av at koyra kolombiska sendiharran, Carlos Holquin, av landinum alt fyri eitt, samstundis sum eg havi givið hermegini við kolombiska markið boð um at standa tilbúgvin, segði Rafael Correa.

Myndugleikarnir í Kolombia siga seg hava prógv fyri, at FARC fær hjálp úr Ekvador, og at uppreistrarrørslan hevur havt beinleiðis samband við Rafael Correa, forseta.

-Millum ognarlutirnar hjá Raul Reyes funnu vit tríggjar teldur, og í teimum eru prógv fyri, at Corres hevur samband við FARC, segði talsmaðurin hjá kolombiska forsetanum, Alvaro Uribe, í gjár.

# Medvedev russiskur forseti



*Vladimir Putin og eftirmaður hansara, Dmitrij Medvedev, á konsertpallinum í Moskva í gjárkvøldið*
*Mynd: Reuters*

**Russiska forsetavalið fekk tað væntaða úrslitið. Dmitrij Medvedev og Vladimir Putin skifta um starv**

Sum siður er, var nógvur ungdómur til konsert á Reyða Torginum í Moskva valkvøldið. Tað vóru myndugleikarnir, sum skipaðu fyri, og konsertin var eitt væl egnað høvi hjá vinnaranum at takka fyri stuðulin.

-Eg takki øllum, sum valdu meg, rópti Dmitrij Medvedev, tá hann og fráfarandi forsetin, Vladimir Putin, vóru komnir upp á pallin.

-Eg takki eisini teimum, sum valdu hini valevnini. Samanlagt hava vit undirtøku frá meiri enn tveimum triðingum av russiska fólkinum, segði tann nývaldi forsetin. Hann legði afturat, at hann ætlar sær at halda somu lós sum undanmaðurin, so at Russland verður eitt gott land at búgva í.

So fór Medvedev burtur frá mikrofonini, og Vladimir Putin tók orðið. Tað var týðiligt, at hann var tann betur umtókti maðurin á pallinum, tí fólk hoyrdu næstan einki av tí, sum hann segði. Tá hann endiliga fekk orðið, takkaði hann veljarunum og bað hini valevnini leggja valið afturum og virka fyri framtíð landsins.

Putin fær framvegis ein týðandi leiklut í russiskum politikki, tí hann skal taka við sum forsætisráðharri eftir Medvedev. Sostatt skifta teir báðir pláss tann 7. mai, tá Medvedev formliga tekur við forsetaembætinum.

### Ikki veruligt val

-Hetta var eitt demokratiskt val, og sigurin hjá Medvedev er trygd fyri, at tann væleydnaði politikkurin fer at halda fram, segði Putin.

Russiska valnevndin fekk fleiri fráboðanir um valsvik, men eygleiðarar siga, at Dmitrij Medvedev hevði vunnið valið uttan svik.

Fleiri vesturlendskir fjølmiðlar finnast í dag hvassliga at valinum. The Financial Times skrivar, at forsetavalið hevði lítið við demokrati at gera. Blaðið vísir millum annað á, at myndugleikarnir steðgaðu veljarafundum hjá valevnunum hjá andstøðuni. Týska blaðið Süddeutsche Zeitung sigur, at valið var so innihaldsleyst, at tað er ein spurningur, um tað yvirhøvur ber til at tosa um eitt val.

Sambært valnevndini fekk Dmitrij Medvedev 68,19 prosent av atkvøðunum. Næstur honum var Gennadij Ziuganov við 18,55 prosentum, og á triðja plássi var tann víðgongdi tjóðskaparmaðurin Vladimir Zjirinovskij við 10,63 prosentum. Tað fjórða valevnið, Andrej Bogdanov, fekk 1,36 prosent.

Valluttøkan í Russlandi í gjár var 67 prosent.

## STUTT SAGT

### Gav seg yvir

Amaro da Costa, sum sambært myndugleikunum var millum teirra, sum royndu at beina fyri teimum politisku leiðarunum í Eystur-Timor, gav seg yvir til løgregluna í gjár. Amaro da Costa, sum er fyrrverandi løgreglumaður, hevði tvær byrsur við sær, tá hann kom á løgreglustøðina. Fleiri tíðindafólk vóru hjástødd, men Amaro da Costa vildi ikki siga, um tað var hann, sum særdi José Ramos-Horta, forseta, ella um hann yvirhøvur er sekur. Myndugleikarnir siga seg vera vísar á, at 17 menn vóru við í álopinum, og at Amaro da Costa var ein teirra. Verður hann dømdur sekur, kann hann fáa 25 ára fongsul.

### Bretar ljósari framtíð

Á landsfundinum hjá bretska Labour-flokkinum um vikuskiftið lovaði Gordon Brown, floksformaður og forsætisráðharri, bretum betri umstøður í komandi árum. Eygleiðarar siga, at orðini hava uttan iva samband við, at í vár verða týðandi lokalval nógvastaðni í Onglandi og í Wales. Í røðuni á landsfundinum segði Gordon Brown, at stjórn hansara fer at leggja dent á at menna skúlaverkið, og hann lovaði, at innan árslok 2010 verða 320 fólkaskúlar bygdir ella nútímansgjørdir.

### Fáa ikki eykalutir

Í USA noyðist stóra bilverksmiðjan General Motors at lata tríggjar av sínum deildum aftur, tí verksmiðjurnar fáa ikki teir neyðugu lutirnar, sum GM keypir frá undirveitarum. Frammanundan hevur GM stongt eina aðra verksmiðju, og tilsamans ganga umleið 12.000 fólk nú fyri einki og bíða. Orsøkin til trupulleikarnar er, at starvsfólk hjá undirveitarunum eru farin í verkfall, tí tey fáa ikki ta løn, sum tey vilja hava. Ein roynd at fáa semju miseydnaðist sunnudagin.